## Turkar illir

Turkiska stjórnin kunngjørdi í gjár, at hon hevði gjørt av at biðja sendiharra sín í Svøríki koma heim. Orsøkin er, at turkar eru sera misnøgdir við, at svenski Ríkisdagurin hevur samtykt eina yvirlýsing, sum staðfestir, at turkiski ágangurin ímóti armenska fólkinum undir fyrra heimsbardaga var fólkadráp. Tað er óvist, hvussu mong fólk doyðu, men helst var talan um meiri enn eina millión fólk. Ætlanin var, at turkiski forsætisráðharrin, Recep Tayyip Erdogan, skuldi fara til Svøríkis at vitja, men hann hevur avlýst ferðina.



## Óskikkiligir prestar

Í Eysturríki hava tríggir katólskir prestar fingið sekkin , eftir at tað er komið fram, at teir høvdu framt kynsligtan ágang ímóti næmingum í katólskum skúlum. Prestarnir arbeiddu í einum kleystri har norðuri í Eysturríki. Í gjár kom eisini fram, at tann katólska kirkjan í týska landspartinum Baden-Württemberg hevur fingið fleiri fráboðanir um kynsligan ágang ímóti børnum. Fyrr hava gølur um kynsligan ágang ímóti børnum rakt ta katólsku kirkjuna í USA, Niðurlondum og Írlandi.

*Lagt til rættis: Inna Tørnroos · inna@sosialurin.fo*

# Soleiðis skal Anna latast í

**Anna Nygaard hevur fingið góð umdømi fyri rødd og framførslu í sangkappingini X factor, men hon hevur fingið av at vita fyri klæðini, hon hevur verið í. Føroyskir klædna-serfrøðingar eru samdar um, at Anna hevur brúk fyri nýggjum stíli. Her eru teirra boð uppá klæði til Onnu Nygaard**



### Anna Mortensen, sniðgevi, fyrrverandi PAU

- Tey hava pyntað Annu alt ov nógv. Tað vakra norðurlendska, sum tey fullu fyri hjá henni, er blivið púra burtur í klæðunun, hon hevur á pallinum. Eg haldi eisini, at tað er eitt sindur keðiligt, at tey prøva seg so nógv fram - hon hevur havt heilt ymiskar stílar hvørja ferð.

- Eg hevði farið aftur til tað norðurlendska og latið hana í ein bundnan kjóla frá Guðrun&Guðrun. Og so hevði eg latið Annu sjálva havt størri ávirkan á klædnavalið.



### Beinta Vilhelmsen, skraddari

- Eg haldi, at Anna hevur verið ov konulig ílatin. Hon er bara 18 ár. Hennara hár hevur eisini verið alt ov uppsett. Hon hevur fantastiskt, langt reytt hár, sum skuldi sloppið at hingið leyst.

Eg hevði dekkað hana eitt sindur til og nýtt nógvar litir. Haldi at klæðnamerkið Odd Molly hevði passað henni sera væl, tí tað er ungdómligt, litríkt og eitt sindur bóndagentuligt.



### Katarina í Geil, stílistur

- Anna er sera dugnalig og ein sterkur persónur. Ein so dugnaligur persónur rúmar nógv, og tí haldi eg, at tey kunnu stramma hennara stíl upp og pressa hana eitt sindur meiri. Nú spæla tey við teimum ymisku stílunum.

- Eg hevði viljað hitt Onnu, áðrenn eg avgeri, hvør klæðnastílur er tann rætti til hennara, men eg haldi, at stílurin hjá Missoni hevði passað væl.